# Løgtingslóg um veiðigjøld fyri fiskiskap, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 216 frá 22. desember 2025

(Veiðigjaldslógin)

*Skylda at rinda veiðigjald*

**§ 1.**[1)] Eigari av fiskifari, undir føroyskum flaggi, sum veiðir av rættindum, Føroyar ráða yvir, skal rinda veiðigjald av veiðu av makreli, sild, lodnu, svartkjafti og botnfiski í Barentshavinum.

**§ 2.** [1)] Veiðigjald skal ikki rindast av veiðu, tá rættindini at veiða eru keypt á uppboðssølu, og uppboðssølugjald skal rindast fyri kvotuna.

*Allýsingar*

**§ 3.** [1)] Í hesi løgtingslóg merkir:
1) Botnfiskur í Barentshavinum: Botnfiskur, sum persónur ella felag fær loyvi at fiska sambært:
   a) fiskiloyvi til botnfisk í russiskum sjógvi í Barentshavinum,
   b) fiskiloyvi til botnfisk í norskum sjógvi norðan fyri 62°N, ella
   c) fiskiloyvi til botnfisk við Svalbard.
2) Sild: norðhavssild og heystgýtandi sild.

*Veiðigjald*

**§ 4.** Veiðigjald verður ásett fyri hvørt fiskaslag sær fyri eitt ár í senn, sum eitt krónugjald fyri hvørt kilo í rundari vekt.

**§ 5.** [1)] [2)] Veiðigjald á makrel, sild og svartkjaft verður roknað eftir ásetingunum í § 9, stk. 1 og 2 og verður lagt á veiðu, landað 1. august til og við 31. juli.

*Stk. 2.* [1)] [2)] Veiðigjald á lodnu verður roknað eftir ásetingunum í § 9, stk. 4 og verður lagt á veiðu, landað 1. mai til og við 30. apríl.

*Stk. 3.* [2)] [3)] Á hvørjum ári, seinast 15. juli, ásetir landsstýrisfólkið í kunngerð veiðigjald fyri makrel, sild og svartkjaft, sum skal vera galdandi 1. august til og við 31. juli árið eftir.

**§ 6.** Veiðigjald á botnfisk í Barentshavinum verður roknað eftir ásetingunum í § 9, stk. 1 og 3, og verður lagt á veiðu, sum er landað frá 1. januar til og við 31. desember.

*Stk. 2.* [3)] Í seinasta lagi 15. desember á hvørjum ári ásetir landsstýrismaðurin í kunngerð veiðigjald á botnfisk í Barentshavinum, sum skal vera galdandi frá 1. januar til og við 31. desember.

**§ 7.** [3)] (Strikað).

*Stk. 2.* [1)] [2)] [3)] (Strikað).

*Stk. 3.* [2)] (Strikað).

**§ 8.** Tá veiðigjald verður álagt, skulu teir í skjali 2 og skjali 3 nevndu umrokningarfaktorar nýtast til umrokning av fiski og fiskavøru til runda vekt.

*Útrokning av veiðigjaldi*

**§ 9.** [1)] Veiðigjaldið er tað í skjali 1, 1A og 1B ásetta prosentið av miðal avgreiðingarvirðinum fyri hvørt kilo í rundari vekt fyri hvørt fiskaslag sær.

*Stk. 2.* [1)] Miðal avreiðingarvirðið fyri makrel, sild og svartkjaft verður gjørt upp fyri hvørt fiskaslag sær. Uppgerðin verður gjørd við støði í avreiðingarprísum og nøgdum í rundari vekt fyri nevndu fiskasløg, sum fiskifør undir føroyskum flaggi landa feskt óvirkað, og sum eru avreidd og fráboðað Vørn 1. juli árið frammanundan, at veiðigjaldið skal áleggjast, og til og við 30. juni sama ár, veiðigjaldið skal áleggjast.

*Stk. 3.* [1)] Fyri botnfisk í Barentshavinum verður miðal avreiðingarvirðið gjørt upp við støði í prísum og nøgdum av toski í rundari

vekt, sum er seldur á almennari uppboðssølu í Føroyum frá 1. desember annað árið frammanundan, at veiðigjaldið skal áleggjast, til og við 30. november árið frammanundan, at veiðigjaldið skal áleggjast. Selda nøgdin av fiski og fiskavøru skal umroknast til runda vekt eftir ásetingunum um umrokningarfaktorar, ásettir við heimild í løgtingslóg um sjófeingi.

*Stk. 4.* 1) Miðal avreiðingarvirðið fyri lodnu verður gjørt upp við støði í avreiðingarprísum og nøgdum í rundari vekt, sum fiskifør undir føroyskum flaggi landa feskt óvirkað, og sum eru avreidd og fráboðað Vørn 1. mai árið frammanundan, at veiðigjaldið skal áleggjast, og til og við 30. apríl sama ár, veiðigjaldið skal áleggjast.

**§ 9 a.** 1) Fyri veiðu av makreli, norðhavssild og svartkjafti, ið er landað frá 1. august 2022 til og við 31. juli 2023, er veiðigjaldið tað í skjali 1, talvu 1-3 ásetta prosentið av miðal avreiðingarvirðinum fyri hvørt kilo í rundari vekt fyri hvørt fiskaslag sær.

*Stk. 2.* Fyri veiðu av botnfiski í Barentshavinum, ið er landað frá 1. januar 2022 til og við 31. desember 2023, er veiðigjaldið tað í skjali 1, talvu 4 ásetta prosentið av miðal avreiðingarvirðinum fyri hvørt kilo í rundari vekt.

**§ 9 b.** 1) Fyri veiðu av makreli, sild, lodnu og svartkjafti, ið er landað frá 1. august 2023 til og við 31. juli 2026, er veiðigjaldið tað í skjali 1A, talvu 1 og 2 ásetta prosentið av miðal avreiðingarvirðinum fyri hvørt kilo í rundari vekt fyri hvørt fiskaslag sær.

*Stk. 2.* Fyri veiðu av botnfiski í Barentshavinum, ið er landað frá 1. januar 2024 til og við 31. desember 2025, er veiðigjaldið tað í skjali 1A, talvu 3 ásetta prosentið av miðal avreiðingarvirðinum fyri hvørt kilo í rundari vekt.

**§ 9 c.** 1) Fyri veiðu av makreli, sild, lodnu og svartkjafti, ið er landað frá 1. august 2026, er veiðigjaldið tað í skjali 1B, talvu 1 og 2 ásetta prosentið av miðal avreiðingarvirðinum fyri hvørt kilo í rundari vekt fyri hvørt fiskaslag sær.

*Stk. 2.* Fyri veiðu av botnfiski í Barentshavinum, ið er landað frá 1. januar 2026, er veiðigjaldið tað í skjali 1B, talvu 3 ásetta prosentið av miðal avreiðingarvirðinum fyri hvørt kilo í rundari vekt.

**§ 9 d.** 1) Veiðigjald eftir hesi løgtingslóg verður ikki rindað av veiðu, sum ikki kann seljast vegna ótilætlaða hending, sum fer fram áðrenn avreitt verður.

*Upplýsingarskylda*

**§ 10.** Tann, sum rekur almenna uppboðssølu av fiski í Føroyum, skal í seinasta lagi 5. desember á hvørjum ári lata Vørn upplýsingar um prís og nøgd av toski, sum er seldur á uppboðssølu frá 1. desember árið fyri til og við 30. november. Vørn letur landsstýrismanninum upplýsingarnar um tosk seldan um almenna uppboðssølu og umroknað til miðal avreiðingarvirði í rundari vekt. Fiskur og fiskavøra skal umroknast til runda vekt eftir ásetingunum um umrokningarfaktorar, ásettir við heimild í løgtingslóg um sjófeingi.

**§ 11.** 1) Vørn skal í seinasta lagi 5. juli á hvørjum ári lata landsstýrismanninum upplýsingar um prís og nøgd í rundari vekt av makreli, sild, lodnu og svartkjafti, sum fiskifør undir føroyskum flaggi hava landað feskt óvirkað, og sum er avreidd og fráboðað Vørn 1. juli árið frammanundan til og við 30. juni.

*Innkrevjing*

**§ 12.** 1) Veiðigjald fellur til gjaldingar so hvørt, veiðan er landað. Veiðigjald fyri lodnu, ið er landað 1. mai árið frammanundan og til og við 30. apríl, fellur til gjaldingar 15. juli.

*Stk. 2.* Vørn ger upp veiðigjaldið og sendir eigara av fiskifari rokning.

*Stk. 3.* Gjaldfreistin er 10 dagar eftir dagfesting á rokning.

*Stk. 4.* Rinda rættindahavarar ikki rættstundis, skal renta rindast við 0,7% fyri hvønn byrjaðan mánað.

**§ 12 a.** 1) 2% av veiðigjaldinum fellur til kommunurnar.

*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um, hvussu inntøkurnar frá gjaldinum verða býttar millum kommunurnar.

**§ 13.** Veiðigjald, umframt renta og møguligur innheintingarkostnaður, kann verða innheintað við panting. TAKS fremur panting eftir reglunum um innheinting av skattum, tó er § 7, stk. 1 í lov for Færøerne om inddrivelse af skatter og afgifter til det offentlige m.m. ikki galdandi.

*Revsiásetingar*

**§ 14.** Er ikki harðari revsing ásett eftir aðrari lóg, verður tann, sum við tí í hyggju at sleppa undan at gjalda veiðigjald sambært

hesi løgtingslóg, greiðir rangt frá, ella á annan hátt gevur villleiðandi upplýsingar, tá gjøldini skulu gerast upp ella áleggjast, revsaður við sekt ella fongsli upp í 2 ár.

*Stk. 2.* Er brotið framt av stórum gáloysni, er revsingin sekt ella, tá ið talan er um skerpandi umstøður, fongsul upp í 4 mánaðir.

*Stk. 3.* Feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar koma undir revsiábyrgd eftir reglunum í kapitli 5 í revsilógini.

*Gildiskoma o.a.*

**§ 15.** Hendan løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2022.

*Stk. 2.* Veiðigjald á botnfisk í Barentshavinum er galdandi fyri veiðu landað frá og við 1. januar 2022.

*Stk. 3.* Veiðigjald á makrel, norðhavssild og svartkjaft er galdandi fyri veiðu landað frá og við 1. august 2022.

*Stk. 4.* Veiðigjald á makrel, norðhavssild og svartkjaft verður í tíðarskeiðinum frá og við 1. januar 2022 til og við 31. juli 2022 goldið eftir ásetingunum í løgtingslóg um serstakar treytir fyri fiskiskapi eftir makreli, norðhavssild og svartkjafti í 2018, 2019, 2020 og 2021 og botnfiski í Barentshavinum í 2020 og 2021.

*Stk. 5.* Løgtingslóg um serstakar treytir fyri fiskiskapi eftir makreli, norðhavssild og svartkjafti í 2018, 2019, 2020 og 2021 og botnfiski í Barentshavinum í 2020 og 2021 fer úr gildi 1. januar 2023.

Í Tinganesi, 5. mai 2021

**Bárður á Steig Nielsen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 136/2020

**Skjal 1** [1)]

**Veiðigjaldstalvur**

**Talva 1: Svartkjaftur**

| Fiskaprísur í kr./kg. | | Veiðigjald |
|---|---|---|
| Frá og við | til | % |
| 0,00 | 1,30 | 11% |
| 1,30 | 1,50 | 12% |
| 1,50 | 1,70 | 13% |
| 1,70 | 1,90 | 14% |
| 1,90 | 2,10 | 15% |
| 2,10 | 2,30 | 16% |
| 2,30 | | 17% |

**Talva 2: Norðhavssild**

| Fiskaprísur í kr./kg. | | Veiðigjald |
|---|---|---|
| Frá og við | til | % |
| 0,00 | 2,50 | 15,5% |
| 2,50 | 3,00 | 16,0% |
| 3,00 | 3,50 | 16,5% |
| 3,50 | 4,00 | 17,0% |
| 4,00 | 4,50 | 17,5% |
| 4,50 | 5,00 | 18,0% |
| 5,00 | 5,50 | 18,5% |
| 5,50 | 6,00 | 19,0% |
| 6,00 | | 19,5% |

**Talva 3: Makrelur**

| Fiskaprísur í kr./kg. | | Veiðigjald |
|---|---|---|
| Frá og við | til | % |
| 0,00 | 6,00 | 17,5% |
| 6,00 | 6,50 | 18,0% |
| 6,50 | 7,00 | 18,5% |
| 7,00 | 7,50 | 19,0% |
| 7,50 | 8,00 | 19,5% |
| 8,00 | 8,50 | 20,0% |
| 8,50 | 9,00 | 20,5% |
| 9,00 | 9,50 | 21,0% |
| 9,50 | | 21,5% |

**Talva 4: Botnfiskur**

| Fiskaprísur í kr./kg. | | Veiðigjald |
|---|---|---|
| Frá og við | til | % |
| 0,00 | 13,50 | 2,50% |
| 13,50 | 14,00 | 2,75% |
| 14,00 | 14,50 | 3,00% |
| 14,50 | 15,00 | 3,25% |
| 15,00 | 15,50 | 3,50% |
| 15,50 | 16,00 | 3,75% |
| 16,00 | 16,50 | 4,00% |
| 16,50 | 17,00 | 4,25% |
| 17,00 | 17,50 | 4,50% |
| 17,50 | 18,00 | 4,75% |
| 18,00 | | 5,00% |

**Skjal 1A** 1)

**Veiðigjaldstalvur**

**Talva 1: Svartkjaftur**

| Fiskaprísur í kr./kg. | | Veiðigjald |
|---|---|---|
| Frá og við | til | % |
| 0,00 | 1,00 | 0% |
| 1,00 | 1,20 | 5% |
| 1,20 | 1,40 | 10% |
| 1,40 | 1,60 | 14% |
| 1,60 | 1,80 | 15% |
| 1,80 | 2,00 | 16% |
| 2,00 | 2,20 | 17% |
| 2,20 | 2,40 | 18% |
| 2,40 | 2,60 | 19% |
| 2,60 | 2,80 | 20% |
| 2,80 | 3,00 | 21% |
| 3,00 | 3,20 | 22% |
| 3,20 | 3,40 | 23% |
| 3,40 | | 24% |

**Talva 2: Makrelur, sild og lodna**

| Fiskaprísur í kr./kg. | | Veiðigjald |
|---|---|---|
| Frá og við | til | % |
| 0,00 | 2,00 | 0% |
| 2,00 | 2,50 | 8% |
| 2,50 | 3,00 | 10% |
| 3,00 | 3,50 | 12% |
| 3,50 | 4,00 | 14% |
| 4,00 | 4,50 | 16% |
| 4,50 | 5,00 | 18% |
| 5,00 | 5,50 | 19% |
| 5,50 | 6,00 | 20% |
| 6,00 | 6,50 | 21% |
| 6,50 | 7,00 | 22% |
| 7,00 | 7,50 | 23% |
| 7,50 | 8,00 | 24% |
| 8,00 | 8,50 | 25% |
| 8,50 | 9,00 | 26% |
| 9,00 | 9,50 | 27% |
| 9,50 | 10,00 | 28% |
| 10,00 | 10,50 | 29% |
| 10,50 | 11,00 | 30% |
| 11,00 | 11,50 | 31% |
| 11,50 | 12,00 | 32% |
| 12,00 | 12,50 | 33% |
| 12,50 | | 34% |

**Talva 3: Botnfiskur**

| Fiskaprísur í kr./kg. | | Veiðigjald |
|---|---|---|
| Frá og við | til | % |
| 0,00 | 13,50 | 2,75% |
| 13,50 | 14,00 | 3,00% |
| 14,00 | 14,50 | 3,25% |
| 14,50 | 15,00 | 3,50% |
| 15,00 | 15,50 | 3,75% |
| 15,50 | 16,00 | 4,00% |
| 16,00 | 16,50 | 4,25% |
| 16,50 | 17,00 | 4,50% |
| 17,00 | 17,50 | 4,75% |
| 17,50 | 18,00 | 5,00% |
| 18,00 | 18,50 | 5,25% |
| 18,50 | 19,00 | 5,50% |
| 19,00 | 19,50 | 5,75% |
| 19,50 | 20,00 | 6,00% |
| 20,00 | 20,50 | 6,25% |
| 20,50 | 21,00 | 6,50% |
| 21,00 | 21,50 | 6,75% |
| 21,50 | 22,00 | 7,00% |
| 22,00 | 22,50 | 7,25% |
| 22,50 | 23,00 | 7,50% |
| 23,00 | 23,50 | 7,75% |
| 23,50 | 24,00 | 8,00% |
| 24,00 | 24,50 | 8,25% |
| 24,50 | 25,00 | 8,50% |
| 25,00 | 25,50 | 8,75% |
| 25,50 | | 9,00% |

**Skjal 1B** 1)

**Veiðigjaldstalvur**

**Talva 1: Svartkjaftur**

| Fiskaprísur í kr./kg. | | Veiðigjald |
|---|---|---|
| Frá og við | til | % |
| 0,00 | 1,00 | 0% |
| 1,00 | 1,20 | 7% |
| 1,20 | 1,40 | 12% |
| 1,40 | 1,60 | 16% |
| 1,60 | 1,80 | 17% |
| 1,80 | 2,00 | 18% |
| 2,00 | 2,20 | 19% |

**Talva 2: Makrelur, sild og lodna**

| Fiskaprísur í kr./kg. | | Veiði-gjald |
|---|---|---|
| Frá og við | til | % |
| 0,00 | 2,00 | 0% |
| 2,00 | 2,50 | 10% |
| 2,50 | 3,00 | 12% |
| 3,00 | 3,50 | 14% |
| 3,50 | 4,00 | 16% |
| 4,00 | 4,50 | 18% |
| 4,50 | 5,00 | 20% |

**Talva 3: Botnfiskur**

| Fiskaprísur í kr./kg. | | Veiði-gjald |
|---|---|---|
| Frá og við | til | % |
| 0,00 | 13,50 | 4,75% |
| 13,50 | 14,00 | 5,00% |
| 14,00 | 14,50 | 5,25% |
| 14,50 | 15,00 | 5,50% |
| 15,00 | 15,50 | 5,75% |
| 15,50 | 16,00 | 6,00% |
| 16,00 | 16,50 | 6,25% |

| | | |
|---|---|---|
| 2,20 | 2,40 | 20% |
| 2,40 | 2,60 | 21% |
| 2,60 | 2,80 | 22% |
| 2,80 | 3,00 | 23% |
| 3,00 | 3,20 | 24% |
| 3,20 | 3,40 | 25% |
| 3,40 | | 26% |

| | | |
|---|---|---|
| 5,00 | 5,50 | 21% |
| 5,50 | 6,00 | 22% |
| 6,00 | 6,50 | 23% |
| 6,50 | 7,00 | 24% |
| 7,00 | 7,50 | 25% |
| 7,50 | 8,00 | 26% |
| 8,00 | 8,50 | 27% |
| 8,50 | 9,00 | 28% |
| 9,00 | 9,50 | 29% |
| 9,50 | 10,00 | 30% |
| 10,00 | 10,50 | 31% |
| 10,50 | 11,00 | 32% |
| 11,00 | 11,50 | 33% |
| 11,50 | 12,00 | 34% |
| 12,00 | 12,50 | 35% |
| 12,50 | | 36% |

| | | |
|---|---|---|
| 16,50 | 17,00 | 6,50% |
| 17,00 | 17,50 | 6,75% |
| 17,50 | 18,00 | 7,00% |
| 18,00 | 18,50 | 7,25% |
| 18,50 | 19,00 | 7,50% |
| 19,00 | 19,50 | 7,75% |
| 19,50 | 20,00 | 8,00% |
| 20,00 | 20,50 | 8,25% |
| 20,50 | 21,00 | 8,50% |
| 21,00 | 21,50 | 8,75% |
| 21,50 | 22,00 | 9,00% |
| 22,00 | 22,50 | 9,25% |
| 22,50 | 23,00 | 9,50% |
| 23,00 | 23,50 | 9,75% |
| 23,50 | 24,00 | 10,00% |
| 24,00 | 24,50 | 10,25% |
| 24,50 | 25,00 | 10,50% |
| 25,00 | 25,50 | 10,75% |
| 25,50 | | 11,00% |

**Skjal 2**

**Umrokningarfaktorar**

| **Fiska slag** | **Kruvdur, við høvdi** | **Kruvdur, uttan høvd** | **Kruvdur, skráskorin** | **Japanskorin** | **Flak við skræðu & beini** | **Flak, uttan skræðu, við beini** | **Flak við skræðu uttan bein** | **Flak uttan skræðu & bein** | **Flak við skræðu uttan ugga** | **Flak uttan skræðu & ugga** | **Fiskamjøl** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Toskur | 1,18 | 1,50 | 1,80 | | 2,60 | 2,90 | 2,95 | 3,25 | | | |
| Hýsa | 1,14 | 1,40 | 1,65 | | 2,65 | 2,95 | 2,80 | 3,15 | | | |
| Upsi | 1,20 | 1,35 | 1,60 | | 2,55 | 2,80 | 2,85 | 3,00 | 3,35 | 3,80 | |
| Svartkalvi | 1,10 | 1,20 | | 1,43 (1) | 1,97 | 1,97 | | 1,97 | | | |
| Svartkalvi | 1,10 | 1,20 | | 1,50 (2) | 1,97 | 1,97 | | 1,97 | | | |
| Longa – Blálonga | 1,20 | 1,40 | | | 2,80 | 2,80 | 2,80 | | | | |
| Brosma | 1,20 | 1,40 | | | 2,55 | 2,55 | | 2,55 | | | |
| Havtaska | 1,20 | 2,80 | | | 5,60 | 5,60 | | 5,60 | | | |
| Steinb. / Liri | 1,10 | 1,65 | | | 4,08 | 4,08 | | 4,08 | | | |
| Hvítingur | 1,20 | 1,40 | | | 2,80 | 2,80 | | 2,80 | | | |
| Lýsingur | 1,20 | 1,40 | | | 2,80 | 2,80 | | 2,80 | | | |
| Konga-fiskur | 1,20 | 1,65 | | 1,95 (3) | 4,77 | 4,77 | | 4,77 | | | |
| Kalvi | 1,10 | 1,35 | | | 2,70 | 2,70 | | 2,70 | | | |
| Reyðsprøka | 1,10 | 1,20 | | | 2,40 | 2,40 | | 2,40 | | | |
| Div. flatfiskur | 1,10 | 1,20 | | | 2,40 | 2,40 | | 2,40 | | | |
| Sild | 1,00 | 1,00 | | | 2,00 | 2,00 | | 2,00 | | | 5,11 |
| Makrelur | 1,15 | 1,30 | | | 2,60 | 2,60 | | 2,60 | | | 5,11 |
| Svartkjaftur | 1,20 | 1,40 | | | 2,80 | 2,80 | | 2,80 | | | 5,11 |
| Hávur | 1,10 | 1,30 | | | | | | | | | |

(1) Japan-skorin svartkalvi við sporli.
(2) Japan-skorin svartkalvi uttan sporl.
(3) Japan-skorin kongafiskur.

**Skjal 3**

## Umrokningarfaktorar í russiskum sjógvi

### Umrokningarfaktorar fyri tosk í sjógvi:

1) Kruvdur, við høvdi 1,18.
2) Kruvdur, avhøvdaður, runtskorin 1,50.
3) Kruvdur, avhøvdaður, beintskorin 1,55.
4) Kruvdur, avhøvdaður, uggaskorin 1,74.
5) Flak við skræðu og beinum 2,65.
6) Flak, skrædlað, við beinum 2,84.
7) Flak, skrædlað, uttan bein 3,25.
8) Flak við skræðu, uttan bein 2,95.
9) Flak við skræðu, uttan bein, uttan búklepa 3,16.
10) Flak, skrædlað, uttan bein, uttan búklepa 3,43.

### Umrokningarfaktorar fyri hýsu:

1) Kruvd, við høvdi 1,14.
2) Kruvd, avhøvdað, runtskorin 1,40.
3) Kruvd, avhøvdað, beintskorin 1,69.
4) Flak við skræðu og beinum 2,76.
5) Flak, skrædlað, við beinum 3,07.
6) Flak, skrædlað, uttan bein 3,15.
7) Flak við skræðu, uttan bein 2,80.
8) Flak við skræðu, uttan bein, uttan búklepa 3,01.
9) Flak, skrædlað, uttan bein, uttan búklepa 3,28.

---

1) Broytt við løgtingslóg nr. 76 frá 1. juni 2023, har § 2 ljóðar soleiðis: “Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd. *Stk. 2.* § 12 a kemur í gildi 1. januar 2024.”

2) Broytt við løgtingslóg nr. 41 frá 25. mars 2025, har § 2 ljóðar soleiðis: “*Stk. 1.* Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og hevur virknað frá framløgudegnum. *Stk. 2.* § 1, nr. 3 kemur í gildi 31. desember 2025. *Stk. 3.* § 1, nr. 4 fer úr gildi 31. desember 2025.”

3) Broytt við løgtingslóg nr. 216 frá 22. desember 2025, har § 2 ljóðar soleiðis: “Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2026.”